J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 04. mei 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# FUNDARFRÁSØGN

## frá býráðsfundi nr. 05/2006

Ár 2006 tann 04. mei kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin á Handilsskúlanum á Kambsdali í stovu nr. 1.01., hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 28. apríl 2006 um innkalling til fundar. Talan er um flutta býráðsfundin frá 28. apríl 2006.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen
Við á fundinum varð Marin Thomsen, fíggjarleiðari
Skrivari: Jákup Frants Larsen , býráðsskrivari

**Mál nr. 19/2006.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2005.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 24. apríl 2006 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2005 frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, undirskrivaður av Jógvan Amonsyni, statsaut. Revisor og Heina Thomsen cand.merc.aud.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 26. apríl 2006 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara post fyri post og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2005 við broytingum (eykajáttanum).

Roknskapurin vísir eitt hall upp á *kr. 7.697.037,00.*

Sambært høvuðsyvirliti 3 í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Byggibúning | -2.992.928,00 | -2.949.000,00 | 43.928,00 |
| 2 | Kommunal virki | 437.212,00 | 1.679.000,00 | 1.241.788,00 |
| 3 | Teknisk mál | -5.432.302,00 | -5.230.000,00 | 202.302,00 |
| 4 | Skúla- og mentamál | -7.446.849,00 | -7.037.750,00 | 409.099,00 |
| 5 | Almanna- og heimsumál | -8.626.647,00 | -8.486.934,00 | 139.713,00 |
| 6 | Umsiting | -4.498.042,00 | -4.743.300,00 | -245.258,00 |
| | **Økið 1-6 tilsamans** | **-28.559.556,00** | **-26.767.984,00** | **1.791.572,00** |
| 7 | Rentukostnaður-netto | -792.376,00 | -1.389.470,00 | -597.094,00 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Økið 1-7 tilsamans** | | **-29.351.932,00** | **-28.157.454,00** | | **-1.194.478,00** |
| 1 | Íløgur - studning | | -12.424.615,00 | -14.150.000,00 | | -1.725.385,00 |
| | **Samanteljing** | | **-41.776.547,00** | **-42.307.454,00** | | **-530.907,00** |
| 83 | Avdráttir av lánum | | -4.540.461,00 | -5.270.580,00 | | -730.119,00 |
| | **Samanteljing** | | **-46.317.008,00** | **-47.578.034,00** | | **-1.261.026,00** |
| 86 | Skattainntøkur | | 38.619.971,00 | 39.788.478,00 | | 1.168.507,00 |
| | **Ársúrslit** | | **-7.697.037,00** | **-7.789.556,00** | | **-92.519.,00** |

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttanir fyri tilsamans kr. 3.175.000,00 í árinum, og eru allar hesar fráboðaðar Innlendismálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 67 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin

Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkar roknskap kommununar fyri 2005.

*Hesar eykajáttanir verða útgreinaðar á niðanfyri standandi hátt:*

**Framdar eykajáttanir:**

| **Øki** | **Íløgur framdar í:** | | **Upphæddir:** | **Fígging:** | | **Endamál:** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Ruskøkið á Klovningi | | 350.000,00 | Innistandandi | | Rakstur |
| 2 | Dekkgrót smábátahavnin | | 1.000.000,00 | Flutt millum konti | | Íløga |
| 3 | Keyp av neysti mtr. 707 | | 380.000,00 | Flutt frá øki 2 | | Íløga |
| 3 | Bussruta Kambsdalur | | 70.000,00 | Innistandandi | | Rakstur |
| 4 | Stuðul ávís endamál | | 100.000,00 | Flutt frá øki 1 | | Rakstur |
| 4 | Skúlin liðuggerð | | 500.000,00 | Innistandandi | | Íløga |
| 4 | Skúlin útsk. vindeygu | | 100.000,00 | Flutt millum konti | | Rakstur |
| 4 | Keyp av listarverkum | | 40.000,00 | Innistandandi | | Rakstur |
| 4 | Skúlabarnaflutningur | | 57.000,00 | Innistandandi | | Rakstur |
| 5 | Innrætting hølir, s. deild | | 367.000,00 | Innistandandii | | Rakstur |
| 5 | Innbúgv sosiala deild | | 75.000,00 | Avlop frá rakstri | | Rakstur |
| 5 | Stovnseting sosiala deild | | 186.000,00 | op av rakstri | | Rakstur |
| | **Tilsamans** | | **3.175.000,00** | | | |

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 26. apríl 2006, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommununnar fyri 2005 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

***Avgerð:***

Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna roknskap kommununar 2005 uttan viðmerkingar. (9-0).

**<u>Mál nr. 20/2006.</u>**

**Viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2007.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Føroya landsbókasavni, dagfest 24. november 2005, sum sent er bókasøvnunum um fíggjarætlanir og roknskapir fyri ávikavist 2007 og 2005.

Sambært § í løgtingslóg nr.79 frá 8. mei 2001, broytt til LL nr. 148 frá 20. desember 2005 stendur í § 14, stk. 2, at frá og við fíggjarárinum 2006 verður árliga studningsprosentið roknað í mun til játtaðu upphæddina á løgtingsfíggjarlógini, tó í mesta lagi 40% av góðkendu fíggjarætlanini.

Umsóknir um stuðul skulu verða Landsbókasavninum í hendi í seinasta lagi 15. mei árið fyri.

Í hesum sambandi var Marini Thomsen, fíggjarleiðara á nevndarfundinum fyri at greiða frá uppskotinum, sum gjørt varð í tøttum samstarvi við Vónbjørt Linjohnsdóttir, bókavørð.

Tá fíggjarætlanin skal verða Landsbókasavninum í hendi 15. mei 2006, so verður neyðugt, at endaligt uppskot saman við tilmæli lagt fyri býráðið á fundinum tann 04. mei 2006, so fíggjarætlanin kann verða innlatin rættstundis, og sostatt koma undir stuðulsveiting.

Sambært fyriliggjandi uppskoti verða útreiðslurnar mettar til kr. 630.520,00 móti kr. 662.480,97 í 2006, t.v.s. at talan er um eina lækking upp á upp á kr. 31.960,97 svarandi til sløk 5%.

Størsta lækkingin er í kontobólki 5, har uppskot er um at avseta kr. 0,00 til keyp av innbúgvi móti kr. 50.000,00 í 2006.

Avsettar eru kr. 403.920,00 til lønir móti kr. 385.230,97 í 2006, t.v.s. ein hækking upp á kr. 18.689,03 svarandi til sløk 5%. Talan verður um lønarhækking til bókavørðin (sáttmálahækking mett), somuleiðis sum lønin til bókasavnshjálparar er hækkað við kr. 15.000,00 úr kr. 40.000,00 í 2006 upp í kr. 55.000,00 í 2007.

Húsaútreiðslurnar eru hækkaðar við kr. 4.500,00 úr kr. 46.500,00 í 2006 upp í kr. 51.000,00 í 2007. Hækkingin er grundað á staðfestum útreiðslur fyri roknskaparárið 2005.

Aðrar útreiðslur eru lækkaðar við kr. 5.000,00 úr kr. 74.000,00 fyri 2006 niður í kr. 69.000,00 fyri 2007.

Inntøkurnar verða mettar kr. 378.312,00 í kommunustudningi, svarandi til 60% og kr. 252.208,00 í landskassastudningi svarandi til 40%. Grundað á at løgtingið hevur lækkað landskassastudningin úr 60%-um niður í 40%, so hevur kommunan sambært avtalu millum kommunufeløgini og Fíggjarmálaráðið fingið kompesatión við at landsskatturin er lækkaður og kommunuskatturin hækkaður tilsvarandi.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 27. apríl 2006, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn, sum javnvigar við kr. 630.520,00 móti kr. 662.480,97 fyri 2006.

Sambært uppskotinum verður kommunustudningurin kr. 378.312,00, meðan landskassastudningurin verður mettur til kr. 252.208,00.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 21/2006.**

**Eykajáttan í sambandi vi havnaútbygging á Enninum (oljuhavn).**

Fuglafjarðar býráð hevur á eykabýráðsfundi tann 02. mars 2006 eftir tilmæli frá einum minniluta í havnanevndini samtykt at byggja eina oljubryggju á Enninum fyri max. kostnað upp á kr. 12,5 mió.

Hesin peningur er ikki tøkur til endamálið, og mælir fíggjarnevndin á fundi tann 24. mars 2006 býráðnum til at heimila kommunalu fyrisitingini at taka upp samráðingar við fíggingarstovnarnar um lántøku upp á kr. 12,5 mió., og at heimila fyrisitingini at taka avgerð í málinum.

Eykajáttanin kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan við kr. 12,5 mió., og kemur sostatt at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2006 við nevndu upphædd.

Tá talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 30. mars 2006 og varð tilmælið frá fíggjarnevndinisamtykt við 6 atkv. Fyri og 3 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni, Tórfríður Abrahamsen og Petur Abrahamsen.

Sostatt verður málið beint til 2. og endaligu viðgerð í býráðnum.

***Avgerð:***

Samtykt varð við 2. viðgerð eftir tilmæli frá fíggjarnevndini at veita eykajáttan kr. 12,5 mió. til havnabygging á Enninum, og at eykajáttanin verður fíggjað við lántøku. (7 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen).

**Mál nr. 22/2006.**

**Eykajáttan í sambandi við normeran av starvi sum sosialráðgevi á sosialu deildini.**

Sosiala nevndin hjá Fuglafjarðar kommunu hevur á fundi tann 7. apríl 2006 samtykt at seta ein sosialráðgeva í starv á sosialu deildini frá 01. september 2006 at rokna. Nevndin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við málinum og biðja býráðið um eina eykajáttan til endamálið.

Fyri 4 mánaðar kostar starvið umleið kr. 92.000,00, sí hjáløgdu lønartalvu.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 26. apríl 2006, og tekur nevndin einmælt undir við tilmælinum frá sosialu nevndini, somuleiðis sum mælt verður til, at peningur til endamálið verður fingin til vega av ætlaða rakstraravlopinum á fíggjarætlanini fyri 2006, sum er kr. 92.565,00.

Eykajáttanin kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan við kr. 92.000,00, og kemur at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2006 við nevndu upphædd.

Tá talan er um eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

***Avgerð:***

Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini um at seta ein sosialráðgeva í starv 1. september 2006. Málið um eykajáttan varð beint til 2. viðgerð á býráðsfundinum 1. juni 2006. (9-0).

**<u>Mál nr. 23/2006.</u>**

**Viðvíkjandi bussleið 410 millum Klaksvík, Leirvík og Fuglafjørð.**

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 26. apríl 2006 viðgjørt uppskot til bussleið millum Klaksvíkina, Leirvík og Fuglafjørð leið 410, nú Norðatunnilin letur upp tann 29. apríl 2006 og leið 400 eftir hetta bert kemur at koyra millum Klaksvíkina og Havnina.

Sum lýst er í skrivi frá býráðsskrivaranum, dagfest 24. apríl 2006, so kemur nýggja bussleiðin at nøkta so at siga allan tørvin fyri flutningi millum Fuglafjørð-kambsdal og Kambsdal Fuglafjørð, burtursæð frá einvegistúrunum úr Fuglafirði til Kambsdals mánadag til fríggjadag kl. 12.50, mánadag til hósdag kl. 11.40 og fríggjadag kl. 10.40.

Talan er um túrarnar kl. 12.50 við skúlanæmingum, og kl. 11.40 og 10.40 við børnum til Frítíðarskúlan.

Sambært hjáløgdum uppskoti til avtalu, so kemur parturin hjá Fuglafjarðar kommunu at verða kr. 289.800,00 árliga. Haraftrat verður kommunan at gera avtalu við AP-bussar um túrarnar, sum lýtir omanfyri, sum framyvir fyribils koma at verða koyrdir á kommunalu leiðini til Kambsdals.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 26. apríl 2006, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at góðkenna ávesgisuppskotið til sáttmála millum Klaksvíkar-, Leirvíkar- og Fuglafjarðar kommunur og Strandfaraskip Landsins um flutning á leið 410.

***Avgerð:***

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt. (5 atkv. fyri og 4 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni, Tórfríður Abrahamsen, Jón Nolsøe Olsen og Petur Abrahamsen. Somuleiðis varð ískoyti samtykt, at settur verður ein bólkur við 2 býráðslimum Jón Nolsøe Olsen og Eyðun á Lakjuni, sum saman við býráðsleiðsluni skuldu verða við til at gera møguligar broytingar á farleið 410, soleiðis at fleiri túrar vórðu koyrdir niðan á Kambsdal. (9-0).

Jón Nolsøe Olsen bað um at fáa hesar viðmerkingar førdar í gerðabókina: Eg havi einki ímóti rutu millum Fuglafjørð og Klaksvík, men av tí at skúlabarnaflutningurin millum Kambsdal og Fuglafjørð verður avskeplaður stemmi ehg ímóti rutu 410.

**Mál nr. 24/2006.**

**Viðvíkjandi húsakeypi hjá K.S.F.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kommunusamskipan Føroya, dagfest 30. mars 2006, har biðið verður um heimild frá kimakommununum til at hækka lánið við kr. 330.000,00 og at leingja afturgjaldstíðina soleiðis, at gjaldið framhaldandi verður sama um mánaðan og tí ikki kemur at ávirka limagjaldið.

Sambært roknskapinum kostaðu húsakeyp + umvælingar kr. 3.630.000,00, meðan lánið, sum nú er er kr. 3.300.000,00 at gjalda yvir 25 ár. Sosattt er staðfest, at kr. 330.000,00 eru fíggjaðar yvir raksturin, og hevur hetta tyngt fíggjarorkuna almikið.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 26. apríl 2006, og mælir nevndin einmælt býráðnum til, at kommunan tekur undir við, at lántøkan verður hækkað við kr. 330.000,00, sum skotið upp av stýrinum, og at hækkingin ikki kemur at ávirki limagjaldið.

***Avgerð:***

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 25/2006.**

**Umsókn frá Herdis B. Og Jón Simonsen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503s.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Herdis og Jón Simonsen, dagfest 03. apríl 2006 um byggiloyvi til sethús.á matr nr. 503s sunnanfyri Bakkageilina.

Málið hevur verið fyri á fundi í teknisku nevnd tann 28. apríl 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í Almennu Byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríðum opi, sum er minst 50 cm í breeidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti vegnum Stovugerði verður gjørdur í samráð við Teknisku Deild.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovu viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd. Kloakkpalnur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
5. Húsini skulu verða sett av Teknisku deild.
6. útgrevstrar- og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis, at fortovskantar og vegur ikki verður skaddir, og einki tilfar frá útgrevstrinum verður sløtt eftir vegunum,og á landsvegin ,har moldin verður løgd á Kambsdali. Um hetta kemur fyri, skal hetta verða tikið upp beinanvegin, og møguligir skaðar verða umvældir.

***Avgerð:***

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

## Mál nr. 26/2006.

**Umsókn frá Thomas Lambastein um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143at.**

Fuglafjarðar kommmuna hevur móttikið umsókn frá Thomasi Lambasteini, dagfest 30. mars 2006 um byggiloyvi til bilhús á matr nr. 143 at.

Málið hevur verið fyri á fundi í Teknisku nevnd tann 28. apríl 2006, og mælir nevndin til, at byggiloyvið verður givið soleiðis, at bygningurin verður settur soleiðis, at úthangið ikki kemr inn á 3 metra breiða vegøkið, og at veggurin móti vegnum verður gjørdur í samráð við teknisku deild.
Bygningurin skal verða settur av teknisku deild

***Avgerð:***

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Jón Nolsøe Olsen

Tórfríður Abrahamsen

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen